Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Hanna Jensen, løgtingsmaður

Svarari: Jenis av Rana, landsstýrismaður í uttanríkis- og mentamálum

Evni: Føroyskt undirvísingartilfar til miðnám

Spurningar:
1. Hvussu gongur við at útvega føroyskt undirvísingartilfar til miðnám?
2. Eru ætlanir um at fáa føroyskt undirvísingartilfar til alt føroyska miðnámsøkið ella bert til úrvaldar lærugreinir?
3. Um ja, hvør er tíðarætlanin til at fremja hesa ætlan, og hvussu kann hon gerast veruleiki?

Viðmerkingar:
Fyri nøkrum árum síðani fór Nám undir at gera undirvísingartilfar til miðnámsstøði eisini, og fyri tær lærugreinir, sum hava fingið føroyskar grundbøkur, er tað ein stórur bati og menning í lærugreinunum.

Eftir stendur, at tað tekur lutfalsliga langa tíð at náa at gera tilfar til allar lærugreinir, ella í minsta lagi til allar kravdar lærugreinir. Eisini á miðnámi er tørvur á at fáa dagført tilfar og á at hava nakað at velja í til hvørja lærugrein.

Næmingar vísa eisini regluliga á, at tørvur er á meira føroyskum tilfari á miðnámi, har sera nógv tilfar enn er á donskum máli.

Nógvur peningur er nú settur av til KT-skipanir til samlaða undirvísingarverkið í Føroyum, men spurningurin er, um eitt av stóru kjarnuøkinum innan skúlagátt, undirvísingartilfar á móðurmálinum til miðnám, er raðfest nóg høgt fíggjarliga?

Kundi tað hugsast, at føroyska samfelagið kundi gjørt eina skundskipan í eitt ávíst áramál fyri at fáa útvegað dygdargott føroyskt tilfar til miðnám skjótari, enn tað nú tykist møguligt. At vit kundu sett nógv meira arbeiðsorku av á Námi í samstarvi við skúlarnar til arbeiðið í eitt áramál sum eina raðfesting.

Føroyska samfelagið hevur stórar avbjóðingar við at tryggja og styrkja tað føroyska málið – og eitt av økjunum, har mong kunnu verða rokkin, er miðnám, har nógv vitanarstørv eru, og stórir partar av okkara ungdómi hava sína gongd í 2-3 ár í hesum týdningarmikla aldri.

Á Løgtingi, 11. mai 2022

Hanna Jensen